# Reynsatindur klárur at loysa

**Sp/f Reynsatindur í Sandavági hevur keypt línuskipið West Freeser, sum seinastu mánaðirnar hevur verið til umvælingar, upppussingar og klassingar á skipasmiðjuni MEST í Havn. Nú er klárt at loysa, og skipari og manning eru sett**

Vilmund Jacobsen

Háldan Gudmundsen og aðrir í Vágum hava fyri eini tíð síðan keypt línuskipið West Freeser, sum er fyrrverandi Pison, ið áður var heimahoyrandi í Klaksvík.

Skipið, sum hevur verið til umvælingar, klassingar og upppussingar á skipasmiðjuni MEST í Havn, er nú klárt at fara til fiskiskap, og ætlanin er at loysa leygardagin.

Tað er Sp/f Reynsatindur, sum hevur keypt West Freeser, ið eisini hevur fingið navnið, Reynsatindur.

## Eiga fimm skip

Háldan Gudmundsen í Sandavági er ein av eigarunum, og hann verður eisini reiðari á skipinum, eins og hann er reiðari á øðrum skipum, sum teir eiga í felag.

Hetta er nevniliga fimmta skipið, sum hesir menninir eiga í felag. Umframt Reynsatind, eru trý onnur fiskiskip, Venus, Havbúgvin og Vesturtúgva. Haraftrat er standby-skipið, Mars Chaser, sum er í oljuvinnu í Angola.

Háldan Gudmundsen sigur, at teir í summar keyptu línubátin Grana frá bankanum, og tað eru loyvini hjá Grana, ið er seldur til Noregs, sum nú eru flutt yvir á Reynsatind.

## Knút skipari

Hann sigur, at skipið hevur fingið manning, og skipari verður Knút Høgagarð á Toftum.

Manningin við Reynsatindi telir 14 mans.

– Skipið liggur við Vestaru Bryggju í Havn, men ætlandi verður farið inn á Toftir um middagsleitið í dag eftir kassum, agni og ísi. Gongst sum ætlað, verður farið til fiskiskap leygardagin.

Háldan sigur, at nú Reynsatindur fer til fiskiskap, er skipið í góðum standi.

– Hetta er eitt gott skip, og vit eru ógvuliga glaðir fyri keypið.

Hann vil tó ikki upplýsa, hvør prísurin er, nú klárt er at loysa til fyrsta túr.



*Manningin við Reynsatindi telir 14, og skipari verður Knút Høgagarð av Toftum*

## Hampilig útlit

Reiðarin heldur, at útlitini eru hampiliga góð, nú tað vísir seg, at toskurin av álvara gongur inn aftur í fiskiskapin, og útlitini við hýsuni eru ikki verri, enn tey hava verið í longri tíð.

– Hýsuveiðan hevur verið vánalig, men í seinastuni hevur hon ikki verið lakari enn annars. Hinvegin sær áhugavert út við toskinum frameftir, sigur Háldan Gudmundsen, reiðari



*Reynsatindur er fyrrverandi West Freeser, ið upprunaliga er línuskipið Pison, sum var heimahoyrandi í Klaksvík*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Metprísir á uppboðssølu

**20,82 krónur fyri kilo. Tað var miðalprísurin fyri søluna av tilsamans 152 tonsum av fiski á Fiskamarknaði Føroya mikudagin**

Vilmund Jacobsen

Miðalprísirnir á Fiskamarknaði Føroya mikudagin vóru millum teir bestu í langa tíð – og kanska helst teir bestu nakrantíð fyri eina so frægа nøgd av fiski, sum talan var um hendan dagin.

Talan var um tilsamans 154 tons, sum vórðu seld fyri góðar 3,2 miljónir krónur.

Hetta gevur ein miðalprís fyri øll fiskasløgini samanlagt á 20,82 fyri kilo.

Orsøkin til, at miðalprísurin var so høgur hendan dagin er í fyrsta lagi, at nógv havtaska, toskur og kongafiskur var á marknaðinum, og haraftrat fingu tey 10-12 tonsini, sum eisini vóru av hýsu, góðan prís.

Bestu miðalprísirnir á havtasku lógu uppi á sløkum 29 krónum fyri kilo, og toskur 3 og toskur 4 fingu miðalprísin 16,22 og 13,41 krónur fyri kilo.

Hýsa 2 fór fyri 15,55, og besti miðalprísurin fyri kongafisk var góðar 17 krónur fyri kilo.

Samanlagt var mikudagurin ein góður dagur fyri skip og bátar á Fiskamarknaði Føroya.

*vilmund@sosialurin.fo*


Starvslýsing

Heimatænastan

## Leiðari til Heimatænastuna í øki 5 Suðuroy

Í tráð við ætlanirnar hjá Heimatænastuni um at samskipa allar tænastur innan eldraøkið, søkja vit eftir einum leiðara til Røktarheimið í Vági. Starvið fevnir eisini um samskipan av heimatænstuni í Suðuroyar sunnaru helvt. Starvið verður sett skjótast gjørligt.

Ert tú ein íverksetari, hevur hug og dirvi at ganga nýggjar leiðir, og møta nýggjum avbjóðingum, er tað tær vit hava brúk fyri.

Talan er um eitt nýtt og spennandi starv við nýggjum avbjóðingum innan eldraraøkið. Sum partur av leiðslutoyminum í øki 5 fært tú møguleikan at vera við til at uppbyggja og samansjóða allar nærtænastur, ið Heimatænastan hevur at bjóða í Suðuroyar sunnaru helvt.

**Í dag fevnir tilboðið í Suðuroyar sunnaru helvt um:**

- 24 búpláss og umlættingarpláss á røktarheiminum í Vági
- 12 búpláss og umlættingarpláss á eldrasambýlinum í Vági
- Heimasjúkrarøkt
- Heimahjálp
- Mattænastu
- Økisterapi
- Dagtilboð til heimabúgvandi pensjónistar

Saman við starvsfólkunum fert tú at skipa eina fyrstafloks samansjóðaða nærtænastu, har vit eftir "Eden hugsjónini" stuðla virkisførleika og vælveru hjá tí einstaka borgaranum. Har góður yrkisligur og menniskjaligur kunnleiki miðvíst tryggjar, at borgarin er í góðum hondum.

**Vit vænta av tær, at tú:**

- Hevur útbúgving og autorisatión sum sjúkrarøktarfrøðingur
- Hevur hollar royndir innan eldraøkið
- Hevur hug og hegna at fyrisita og leiða
- Hevur evni at samstarva við búfólk, avvarðandi, starvsfólk og leiðslu
- Hevur teldufførleika á brúkarastøði
- Fyrimunur er, um tú hevur eftirútbúgving innan leiðslu
- Koyrikort til bil

**Sum leiðari hevur tú ábyrgdina av:**

- Dagligu leiðsluni og fakligu ábyrgdina av veittum tænastum.
- At stuðla og menna starvsfólki
- At búfólkaeindirnar virka í samsvar við "Eden hugsjónina"
- At virkað verður innan givnar fíggjarkarmar

**Vit bjóða:**

- Eitt dynamiskt og fjølbroytt starv
- Eitt jaligt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
- Eitt starv við nógvum avbjóðingum
- Fakliga og persónliga menning

Starvið er skipað við tilvísing til Økisleiðaran í Heimatænastuni í øki 5

**Setanar- og lønarviðurskifti:**

Setanarstaðið er Nærverkið við tænastu í løtuni í Heimatænastuni í øki 5. Løn- og setanarviðurskifti er sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Jeannu í Lágabø, økisleiðara, á tlf. 373907.

**Umsóknir:**

Skrivlig umsókn saman við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu sendast til:

Nærverkið / Heimatænastan
Stílað: Gunnleyg Durhuus, leiðari
Argjavegur 26
Postsmoga 3037
FO 110 Tórshavn

**Umsóknarfreist : 17. januar 2011**

Nærverkið veitir tænastur til borgarar við serligum tørvi, sum búgva heima, á bústovnum ella á sambýlum. Vit skapa møguleikar fyri lívsgóðsku við støði í tørvi og førleika hjá tí einstaka. Okkara eyðkenni er, at starvsfólkið leggur dent á professionalismu, dygd og nærleika. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almannamálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Børn & Ung. Umleið 1600 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo